# 70 ÁR

fleiri fløgg eftir. Øll føroysk skip, sum vóru í Aberdeen, fingu nú føroyskt flagg, um tey vildu hava tað.

## Hermenn fagnaðu Merkinum

Trolararnir Tór 1 og Tór 2 vóru eisini í Aberdeen hesar dagarnar. Stýrimaðurin á Tór 1, Jóannes Árting, greiddi seinni frá, at 19. apríl varð føroyskt flagg málað á skipssíðurnar, og úr landi fingu teir føroyskt flagg. Allir mans umborð tóku húgvuna av høvdinum, tá flaggið varð heysað, og tá teir sigldu út, gjørdi øll manningin á einum bretskum herskipi honnør og rópti leingi livi fyri Føroyum og Føroya fólki.

Jóannes Árting greiddi frá, at fólk komu at taka í hondina á føroyingunum og ynsktu teimum til lukku við flagginum. Inni í krambúðum og á vertshúsum søgdu bretar, at tað var natúrligt, at føroyingar høvdu sítt egna flagg. Í Aberdeen var sostatt heilt greitt, skrivar Niels Juel Arge í 1. bindi av Stríðsárunum, hvørjum flaggi føroyingar skuldu sigla undir, meðan tað í Føroyum var ógreitt.

Í Føroyum noktaði Hilbert, amtmaður, fyri at lata føroyingar sigla við Merkinum, tí Danmark hevði ongantíð góðkent flaggið. Tann einans 26 ára gamli bretski konsulin, Mason, segði eisini í fyrstani, at føroyingar skuldu brúka danskt flagg. Men tann 18. apríl fór »Nýggjaberg« norður til Bjarnoynna at fiska, og hann heysaði av sínum eintingum føroyska flaggið, tí hann helt tað vera tryggast.

Tveir dagar seinni boðaði amtmaðurin bretska konslinum frá, hann vildi ikki gera ímóti reglum og fyriskipanum hjá hersetingarvaldinum, sum kundu koma tryggleikanum hjá skipunum í vanda. Samstundis gjørdi hann tó greitt, at hann vildi hava eina skipan at galda, sum ikki broytti Føroya støðu í ríkinum, tá viðurskiftini komu í rættlag aftur.

Tann 22. apríl væntaðu føroyingar, at amtmaðurin fór at kunngera, at føroysk skip skuldu sigla undir føroyskum flaggi. Men tað einasta, hann



*Flaggdagurin hevur 70 ár á bakið. Í nógv ár hevur hann verið hildin av bæði stórum sum smáum.*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

segði, var, at skipini skuldu skriva Føroyar á skipssíðuna í staðin fyri Danmark. Sama dag boðaði Mason so amtmanninum frá, at boð vóru komin úr London um, at danskt flagg kundi ikki góðtakast longur, men legði aftrat, at møguliga kundi annað flagg enn tað føroyska brúkast.

## Uppskot um grønt flagg

Skip, sum skuldu avstað, høvdu fyri neyðini at vita, hvørjum flaggi tey skuldu sigla við, og tann 23. apríl fór trolaraskiparin, Esmar Fuglø, at spyrja bretska konsulin, hvussu vorðið var við spurninginum. Mason svaraði, at spurningurin fór at verða avgreiddur um fáar dagar, og at ætlanin var at nýta eitt grønt flagg við hvítum krossi. Uppskotið um grøna flaggið átti Mason sjálvur.

Um kvøldið hendan sama dagin var fundur í teirri serligu krígsnevndini hjá løgtinginum. Har setti Thorstein Petersen, formaður í Fólkaflokkinum, fram uppskot um, at føroysk skip skuldu sigla undir føroyskum flaggi. Andrass Samuelsen, formaður í Sambandsflokkinum, skeyt upp, at Dannebrog skal brúkast sum higartil, og at merkingin á føroysku skipunum skuldi broytast frá Faroes til Føroyar.

Fyri uppskotinum hjá Andrassi Samuelsen atkvøddu hann sjálvur og Petur Mohr Dam, formaður í Javnaðarflokkinum, í fyrstu syftu. Í aðru syftu atkvøddi Petur Mohr Dam saman við Thorsteini Petersen og Louis Zachariassen, formanni í Sjálvstýrisflokkinum, fyri uppskotinum hjá Thorsteini Petersen um, at skipini skuldu sigla við føroyskum flaggi.

Um middagsleitið 24. apríl fór bretski konsulin so at hitta Hilbert, amtmann, um flaggsspurningin. Amtmaðurin endurtók, at hann kundi ikki góðkenna annað flagg enn Dannebrog, men greiddi samstundis frá, at hann undir mótmæli vildi útinna øll tey boð, sum bretska stjórnin gav honum viðvíkjandi fløggum og øðrum spurningum.

## Flaggið loksins góðkent

Millum manna frættist onki við vissu um, hvat var vási í flaggsspurninginum. Okkurt hoyrdist um, at grøna flaggið var felt, men at amtmaðurin var ikki at vika. Ungmannafelagið Merkið boðaði tí til almennan fund á Tinghúsvøllinum 24. apríl kl. 20.30, har Jóannes Patursson segði frá, at fyrireikararnir høvdu sett saman eina áheitan á amtmannin um at lata føroysk skip sigla við Merkinum.

Jóannes Patursson heitti á mannfjøldina um eins og krígsnevndin at taka undir við føroyska flagginum, tí amtmansins støða at mótmæla øllum fløggum uttan Dannebrog førdi Føroyar beint í kríggið, og hendan støðan var ikki at fata. Hann helt eisini, at um kongur Danmarkar visti um støðuna, hevði hann onki havt ímóti, at føroyingar flaggaðu við Merkinum.

Av Tinghúsvøllinum varð farið bæði til amtmannin og bretska konsulin við samtykt um, at føroyska flaggið skuldi nýtast. Mannfjøldin taldi 7-800 fólk. Amtmaðurin mótmælti framvegis, men bretska konsulin rein mótmælið við, tí dagin eftir, tann 25. apríl í 1940 kl. 17.00, sendi Mason amtmanninum bræv um, at avgerðin um flaggið var fallin. Føroysk skip skuldu sigla við Merkinum og merkjast Faroes, Føroyar ella Færøerne.

Mason gjørdi hetta, tí samtyktin í krígsnevndini, mótmælisfundurin og skrúðgongur høvdu sannført hann um, at føroyingar av innastu sál vildu hava skipini at sigla við Merkinum. Amtmaðurin boðaði nú frá, at hann fór at gera eftir boðunum, men føroyingar frættu tíðindini um góðkenda flaggið í BBC, sum á øllum heimsins høvuðsmálum boðaði frá, at føroysk skip nú sigldu undir føroyskum flaggi.

Tíðindini vórðu væl fagnað um landið, og fólk stevndu til fundar á Tinghúsvøllinum, haðani fagnaðargonga við fløggum fór út í Rættará til bretska konsulin. Steðgað varð uttan fyri høvuðsstøðina hjá hersetingarvaldinum, har føroyski og bretski tjóðsangurin vórðu sungnir. Síðan varð aftur farið á Tinghúsvøllin, har heitt varð á mannfjøldina um at minnast 25. apríl sum flaggdag Føroya.

Og sunnudagin hevur 25. apríl so verið flaggdagur Føroya í 70 ár.

**Keldur:**
Stríðsárini, 1. bind, 1985, Niels Juel Arge
Merkið, 1980, Niels Juel Arge
Løgtingið 150, 1. bind, 2002, Hans Andias Sølvará